# Tekst- og samskiftisfólk til Marknaðardeildina

BANKNORDIK

**Marknaðardeildin hevur ábyrgd av branding, marknaðarføring og samskifti í samtakinum, bæði innanlands og uttanlands. Vit sóknast nú eftir einum tekst- og samskiftisfólki til Marknaðardeildina, og kanska er tað júst tær, vit leita eftir.**

**Starvið**
Sum tekst- og samskiftisfólk fært tú ábyrgd av at skriva og tillaga tekst til heimasíðu, intranet, tíðindi, faldarar, starvslýsingar, produktbløð og annað. Tú verður ein virkin viðspælari, tá umrøður at orða og viðlíkahalda bankans strategi á samskiftisøkinum, herundir samskiftispolitikk og samskiftisstíl bæði innanhýsis og uttanhýsis. Eisini fært tú ábygd av at dagføra og áhaldandi menna heimasíðu og intranet bankans.

Tú fert at taka lut í verkætlanum til at stuðla undir branding av samtakinum, at samskipa og íverkseta samskifti bankans og eisini at vera við í menning av maknaðarføringskonseptum av vørum og tænastum hjá bankanum. Aðrar fyrifallandi uppgávur eru eisini møguligar.

**Førleikakrøv**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving og hevur royndir og evni innan samskifti og marknaðarføring. Tú dugir væl at skriva léttan og greiðan tekst og ert stinn/ur í bæði føroyskum og donskum. Tað er ein fyrimunur, um tú eisini ert køn/ur í enskum. Persónligu eginleikar tínir eru m.a. opinleiki, framsøkni, málsøkni, góð samskiftisevni og sjálvstøðugt arbeiðslag, eins og tú megnar at hava greiðu á fleiri uppgávum í senn.

**Menningarmøguleikar**
Góðir møguleikar eru fyri víðari førleikamenning, bæði fakliga og persónliga.

**Meira at vita**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Tór Verland Johansen, marknaðarleiðara, á tel 330 330 ella á tvj@banknordik.fo.

Skrivlig umsókn saman við avritum av CV og prógvum skal sendast til starvsfolk@banknordik.fo ella til BankNordik, Att: Starvsfólkadeildin, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2011.

Les meira á www.banknordik.fo/starv

SENDISTOVAN

## Kom við 62°N travel




# til The Eagles

og hoyr heimskenda rock-bólkin framføra live 15. juni 2011

Prísur fyri hvønn í dupultkamari: **Kr. 5.500**

Eyka prísur fyri einakamar: **Kr. 900**

Vit flúgva til Billund 14. juni, har bussur avheintar ferðalagið og koyrir til Aalborg. Vit gista í tvær nætur á Helnan Phønix Hotel ****, sum er mitt í Aalborg. Privatbussur koyrir ferðalagið 15. juni til konsertina í Hjallerup, og koyrir síðani heimaftur, tá ið konsertin er liðug.

Íroknað
- Flogferð Vágar - Billund t/r
- Avgjøld
- Uppihald á Helnan Phønix Hotel **** í dupultkamari
- Morgunmatur
- Atgongumerki til konsertina í Hjallerup 15. juni
- Bussur Billund - Aalborg t/r
- Bussur frá Helnan Phønix Hotel til konsertina í Hjallerup t/rv

Túrurin verður bert gjørdur um nóg góð undirtøka er. Fyribils tilmeldingarfreist er 19. apríl 2011 - avmarkað pláss. Send fyrispurning til martina@62n.fo ella ring tlf 340013 (beinleiðis)

Sosialurin 341800

62°N travel

...so er ferðin byrjað!

62N.fo nú eisini á iPhone og Android

Les meira á 62n.fo

Hoydalsvegur 17 · 100 Tórshavn
Tel: 34 00 00 · booking@62n.fo